Roynt verður at varðveita floksheildina frá 1.g. allan vegin í gymnasiinum, so teir næmingar, sum hava gingið saman í 1.g., framvegis hava somu vinfólk og somu lærarar í so mongum lærugreinum sum gjørligt, eisini eftir greinabýtið. Hetta veldst um rúmviðurskiftini og lærarakreftirnar á skúlanum. Tað vil sum oftast bera til í felagslærugreinunum. Sundurbýtingin í greinir skuldi tí helst víst í undirvísingini í teimum serstøku høvuðsfakunum, sum sermerkja hvørja av greinunum. Býtingin førir við sær, at næmingarnir koma at ganga saman við nýggjum kammirátum í sergreinunum, eins og teir vilja koma at skifta lærarar í nøkrum av hesum greinunum.

# tímaskipan

| FAK | MÁLSLIGA DEILD | | | | | | | MATEMATISKA DEILD | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Felags-Fak | | | Serfak | | | | Felags Fak | | | Serfak | | | | | |
| | | | | Nýmálslig grein | | Samfelags grein | | | | | Matematisk Fysisk grein | | Samfelags-grein | | Naturfaklig grein | |
| | 1. | 2. | 3. | 2. | 3. | 2. | 3. | 1. | 2. | 3. | 2. | 3. | 2. | 3. | 2. | 3. |
| Religión | 0 | 1 | 2 | | | | | 0 | 1 | 2 | | | | | | |
| Føroyskt | 4 | 3 | 3 | | | | | 4 | 3 | 3 | | | | | | |
| Danskt | 3 | 3 | 3 | | | | | 3 | 3 | 3 | | | | | | |
| Eingilskt | 4 | | | 4 | 6 | | | | | | | | | | | |
| Týskt | 3 | | | 3 | 5 | 3 | 5 | 5 | 0 | 0 | | | | | | |
| Franskt | 5 | 3 | 3 | | | | | 5 | 3 | 3 | | | | | | |
| Latín | 4 | | | 4 | 0 | | | | | | | | | | | |
| Fornald.fr. | 1 | | | 2 | 0 | 2 | 0 | 1 | 2 | 0 | | | | | | |
| Søga + Smfl. | 2 | 3 | 3 | 0 | 1 | | | 2 | 3 | 3 | 0 | 1 | | | 0 | 1 |
| Smfl. fak | | | | | | 5 | 5 | | | | | | 5 | 5 | | |
| Geografi | 2 | | | | | 3 | 2 | | | | 3 | 0 | 3 | 2 | 3 | 2 |
| Biologi | 0 | 0 | 3 | | | | | | | | 0 | 3 | 0 | 3 | | |
| Biokemi | | | | | | | | | | | | | | | 3 | 7 |
| Kemi | | | | | | | | 2 | | | 3 | 0 | 1 | 0 | 3 | 0 |
| Fysikk | | | | | | | | 3 | | | 3 | 5 | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Matematikk | 2 | 3 | 0 | | | | | 5 | | | 5 | 6 | 3 | 3 | 3 | 3 |
| Sangur | 1 | 1 | 1 | | | | | 1 | 1 | 1 | | | | | | |
| Fimleikur | 2 | 2 | 2 | | | | | 2 | 2 | 2 | | | | | | |

# samfelagsgreinin

Tað er ein sannroyndur lutur, at samfelag okkara er meira komplicerað nú enn áður, og torførari er at finna út av, hvørjar tær kreftir eru, ið virka á tað bæði uttan- og innanlands.
Hetta er atvoldin til, at vit í árunum eftir seinna heimsbardaga hava fingið ein miklan vøkstur av einari nýggjari vísindagrein, sum verður rópt vísindin um samfelagið.
Men tað er ikki nóg mikið, at bert nakrir fáir vísindamenn kenna til hesi fyribrygdi. Neyðugt er, at øll tey, sum vaksa upp, fáa hollan kunnleika um hesi viðurskifti.
Men alt gerst ikki í einum, og sum ein byrjan varð í Danmark í 1961 samtykt, at studentaskúlar skuldu hava samfelagsgrein í 2. og 3.g.

Ein slík grein byrjaði í Føroyum í 1972.
1. hálvár verður lisið sociologi,
2. hálvár hava vit nationaløkonomi, læran um, hvussu pengar ferðast runt í samfelagnum, og hvussu teir verða nýttir av tí almenna og teimum privatu.
3. hálvár verður lisið politologi ella politisk vísind, og
4. hálvár altjóða politikkur.
Harumframt skulu vit seinna árinum specialæ, har eitt ávíst evni verður viðgjørt.
Harumframt skulu vit í seinna árinum gera eitt speciali, har eitt ávíst evni verður nágreiniliga viðgjørt

# natúrfaklig grein

Ætlanin er at byrja eina naturfakliga grein á skúlanum komandi skúlaár. 15 næmingar hava boðað frá luttøku. Á naturfakligu greinini eru høvuðsfakini biologi og geografi.

Greinin er ikki ein sergrein, men meira ein almenn grein, hvar heldur størri dentur verður lagdur á biologi og geografi í ásannan av, at ein breiðari og meira djúptgangandi kunnleiki á hesum natúrvísindaligu økjum hevur stóran týdning fyri alla okkara tilveru. Stórur dentur verður lagdur á venjingar og royndir. Biokemi verður tikið við so mikið, sum tørvur er á.




Skúlin endar, og uppflyting verður 30. juni kl. 10.

Skúlin byrjar aftur 18. august kl. 9.

# EDV

Eins og í skúlaárinum 1971-72 var í hesum skúlaárinum eitt grundskeið í EDV á 16 lektiónir (ca. 1 1/2 tíma).
Av 56, ið byrjaðu skeiðið, gjøgnumførdu hesi 34: Úr 2.x: Oddmar, Jenny, Guðny, Marita, Emly, Sverre, Annleyg, Elin, Gudmund, Johannes, Gunnar, Magni og Sjúrður. Úr 2.y: Peter, Kjartan, Jóan Hendrik, Kári S., Marcus, Hans Pauli, Jógvan J., Justinus, Hóraldur, Dávur, Kári S., Jógvan M., Elieser og Fríðfinnur. Úr 2.n: Jákup og Djóni. Úr 1.y: Birgir, Kári, Olaf og Suni.
Fyrst helt Jákup fyrilestrar (3 lektiónir) um grundleggjandi datologi og EDV. Síðani 11 lektiónir í programmering (FORTRAN).
At enda var demonstration á p/f DATA, har luttakararnir fingu koyrd sjálvgjørt





Fyrst helt Jákup fyrilestrar (3 lektiónir) um grundleggjandi datalogi og EDV. Síðani 11 lektiónir í programmering (FORTRAN).
At enda var demonstratión á p/f DATA, har luttakararnir fingu koyrd sjálvgjørd program.
Umframt grundskeiðið hava einstakir næmingar, ið luttóku í skeiðnum í 1971-72, koyrt í fleiri umførum á p/f DATA, og væl kom burturúr.
Lærarar í skeiðnum hava verið: Jákup, Petur og Poul Erik.



# Hoydalar Kykmyndafelag

Í december mánaði varð HOYDALAR KYKMYNDA-FELAG stovnað. Teir fyrstu 4 mánaðirnar vórðu 5 filmir vístir. Teir vóru:

DE 63 DAGE (pólskur)
JEANNE D'ARC (danskur)
FRISTEN UDLØBER VED DAGGRY (russiskur)
LØRDAG AFTEN - SØNDAG MORGEN (enskur)
NAKRIR STUTTFILMIR (m.a. CHAPLIN)

Áhugin fyri hesum hevur víst seg at vera hampiligur, og áskoðaratalið var í miðal 140.
Fyrst í mai skipaði nevndin seg av nýggjum, og formaður varð Heri Olsen.
Nýggja nevndin avgjørdi at melda felagið inn í "Sammenslutningen af Danske Film-klubber", við tað, at hetta gevur felagnum møguleikar fyri at leiga eitt stórt úrval av filmum bíliga. Haraftrat ætla vit at samarbeiða við "Filmslistafelagið" fyri at gera úrvalið enn størri.
Roknast kann við minst 10 flimum hvørt skúlaár. Hóast hesa miklu mongd av filmum er limagjaldið einans 15 kr. um árið.
Ætlanin við felagnum er at vísa fólki aðrar filmar enn teir, vit vanliga síggja í bio-grafunum og at royna film sum list.
Vónandi verður tikið væl undir við hesum tiltaki.





# LÆRARARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Formaður: | PETUR ZACHARIASSEN |
| Næstformaður: | ÁSMUNDUR JOHANNESEN |
| Skrivari: | HANS JÁKUP DEBES |

*Reglugerð fyri Lærararáð*
*á Føroya Studentaskúla*

§ 1. Limir í lærararáðnum eru rektarin og allir á skúlanum virkandi lærarar. Tó eru orlovvikarar, ið virka í minni enn 1 skúlaár, og aðrir lærarar við færri enn 8 skematímum ikki limir.

§ 2. Millum limirnar velur lærararáðið: Formann, næstformann og skrivara; til hesi størv kann rektarin ikki veljast. Lærararáðið avger sjálvt arbeiðsætlan sína. Valt verður á hvørjum ári beint eftir summarfrítíðina.

§ 3. Formaðurin kallar lærararáðið saman, so ofta sum tørvur er á tí, tó í minsta lagi 5 ferðir árliga. Hann hevur skyldu at samankalla tað, um rektarin ella í minsta lagi ein fimtingur av limum ráðsins krevur tað.
Limir lærararáðsins hava skyldu at koma á fund. Avboð skal gevast formanninum fyri fundin. Lærarar, ið ikki eru limir, hava rætt til at vera á fundi og hava loyvi at taka orðið.
Fundurin skal við uppslagi verða lýstur 8 dagar fyri fundardagin. Formaðurin kann tó, í átrokandi málum, eftir áheitan frá rektaranum kalla ráðið saman við styttri frest.
Formaðurin ger fundarskránna og lýsir hana við uppslagi í seinasta lagi 2 dagar fyri fundin. Limir lærararáðsins kunnu við at venda sær til formannin í seinasta lagi 3 dagar fyri fundin fáa mál á skránna. Tó kann nýtt mál setast á fundarskránna, um lærararáðið er fyri tí. Lærarar,

ið ikki eru limir, starvsfólk og næmingar kunnu eftir somu reglum fáa mál á fundarskránna.

Fundarskrá:

1. Formaðurin setir fundin.
2. Skrivarin lesur gerðabókina frá seinasta fundi.
3. Viðmerkingar til gerðabókina.
4. Rektarin orienterar.
5. Innkomin mál.
6. Ymist.

Lærararáðið kann bjóða starvsfólki og umboðum fyri næmingarnar at luttaka á fundum lærararáðsins yvirhøvur ella í serligum málum, uttan atkvøðurætt.

Hesar reglur galda ikki fyri § 8-fundir.

§ 4. Avgerðir lærararáðsins verða tiknar við vanligum meiriluta (undantak sí § 8). Stendur á jøvnum, eigur formaðurin avgerðina. Ein og hvør limur kann seta fram uppskot til samtyktar um mál á fundarskránni.

Skrivarin skal føra fundargerðabók, ið verður undirskrivað av formanninum. Atkvøðugreiðslur verða førdar inn við atkvøðutølum. Minnilutar kunnu fáa viðmerkingar í gerðabókina.

§ 5. a) Lærararáðið velur sínar limir í studningsnevndina.

b) Lærararáðið velur sínar limir í samstarvsnevndina.

c) Lærararáðið tekur avgerð um keyp ella endurnýggjan av læruamboðum, størri innbúgvi og tólum yvirhøvur innan fyri skúlans fíggjarætlan.

d) Lærararáðið gevur tilmæli í hesum málum:

1. Royndarundirvísing.
2. Keyp ella endurnýggjan av læruamboðum, størri innbúgvi og tólum yvirhøvur í øðrum føri enn undir c) nevndu.

§ 6. Lærararáðið skal fáa høvi til at geva ummæli, áðrenn avgerð verður tikin í hesum málum:

a) Treytirnar fyri upptøku av næmingum.

b) Spurningar um grovari dømi um vantandi samarbeiði

lærarar og næmingar ímillum, og hvat skal gerast við tað.

c) Tal av klassum og deildum.
d) Tíma- og lærugreinabýti.
e) Viðvíkjandi lærugreinabýti við setan av lærarum ella stovnan av størvum.
f) Fíggjarætlan skúlans.
g) Bygging.
h) Skipan av ársroyndum og hvussu umfatandi tær skulu vera.
i) Býti av vikartímum fyri longri tíðarskeið.
j) Útferðir.
k) Nýtsla av skúlanum.

§ 7. Rektarin fær avgerðir, tilmæli og ummæli lærararáðsins sum útskrivingar úr gerðabókini.

§ 8. Á hesum fundum verða bert viðgjørdir terminskarakterir og uppflyting. Rektarin leiðir fundin.

Bert teir lærarar, ið hava avvarandi flokkar, hava møtiskyldu.

Rektarin undirskrivar í hesum málum vegna lærararáðið, men kann annars vísa til avgerð lærararáðsins.

Er ikki einmælt semja um at flyta ein næming upp í næsta flokk, verður farið fram á henda hátt:

Hvør lærari, sum hevur hendan næming, setur fram grundaða hugsan, um næmingurin í lærugrein hansara er egnaður til at flytast upp, og út frá hesum atkvøður hann fyribils ja ella nei. Aftaná tjak um hesi sjónarmið verður skrivliga atkvøtt, og skal lærarin nú eftir bestu sannføring síni atkvøða, um næmingurin skal flytast upp ella ikki. Um helvtin atkvøður fyri seinnu ferð, verður næmingurin fluttur upp, um $^2/_3$ eru ímóti verður hann ikki uppfluttur. Í øðrum førum avger rektarin á fundinum, um næmingurin skal flytast upp ella ikki flytast upp.

Við atkvøðugreiðslum um uppflyting galda hesar atkvøðureglur:

Hvør lærari hevur líka nógvar atkvøður sum hansara lærugreinir hava karakterir, sum telja við til árskarakterin. Karakterurin í frágangi gevur tó onga atkvøðu. Harumframt hava lærarar í tónleiki og religión 1 atkvøðu hvør.

Um næmingurin ikki verður uppfluttur í næsta flokk, skal lærararáðið umrøða hvørji ráð skulu gevast hesum næmingi.

§ 9. Lærararáðið eigur regluliga at umrøða arbeiðsbyrðu næminganna, so hon verður so javnt býtt um árið sum gjørligt. Umframt at viðgera arbeiði næminganna í skúlanum, eigur lærararáðið eisini at royna at gera sær eina mynd av, um spurningar og trupulleikar uttan fyri skúlan ávirka arbeiði næminganna.

§ 10. Henda reglugerð kemur í gildi 10. apríl 1972, men skal viðgerast aftur innan 1. oktober 1973.



# NÆMINGAFELAGIÐ

Næmingafelag Føroya Studentaskúla.

## REGLUR FYRI NÆMINGAFELAGIÐ.

Allir næmingar á Føroya Studentaskúla eru limir í næmingafelagnum.

### Endamál.

Endamál Næmingafelag Føroya Studentaskúla er at verja og fremja áhugamál næminganna.

### Val og skipan av nevnd.

Val av 5-mannanevnd er eina ferð um árið, í september. Um ein meiriluti av limunum krevur tað, kann bnývaI vera. Allir limir í NFS kunnu uppstillast til valið. Áðrenn val fer fram, skal listi yvir tey uppstilladu vera gjørdur og góðkendur av teimum uppstilladu. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, kassameistara og skrivara. Fráfarandi nevndin skipar fyri vali av næstu nevnd.

### Skyldur hjá nevndini.

Høvuðsuppgávan hjá nevndini er at umboða næmingarnar úteftir.

Harumframt hevur nevndin skyldu at

- syrgja fyri, at roknskapur og gerðabók verða førd.
- fáa Vitan út eina ferð um mánaðin.
- skipa fyri samstarvi við lærararáðið.
- hava næmingafelagsfund við skrá, sum er kunngjørd frammanundan, minst eina ferð um mánaðin. Áðrenn hendan fundin eru klassafundir í skúlatíðini, har næmingarnir finna fram til tey mál, tey vilja hava viðgjørd á næmingafelags - fundinum.
- fáa í lag minst 4 veitslur um árið.

Aðrar uppgávur hjá nevndini.
Nevndin eigur, tá ið eitthvørt mál skal viðgerast, at skipa fyri valum av serstøkum bólkum at taka sær av teimum. Allir áhugaðir næmingar kunnu arbeiða í hesum bólkum. Bólkarnir kunnu t.d. arbeiða við Vitanum, ítrótti, veitslum, filmum, tjakfundum og lesiringum.

## ARBEIÐIÐ HJÁ NÆMINGAFELAGNUM.

Val og skipan av nevnd.
Nevndin var vald 29. september 1972 og skipaði seg soleiðis:
Formaður: Magni Dalsgaard
Skrivari: Finnur Helmsdal
Kassameistari: Jógvan Mørkøre
Blaðstjórn á Vitanum: Elin Henriksen og
Tróndur Hansen

Fundir.
Tjakfundir vóru fyrstu ferð í øllum flokkum á skúlanum tann 26. oktober 1972.
Á fudninum skuldu næmingarnir tjakast um mál, ið viðvíkja skúlanum, næmingafelagnum og øðrum áhugamálum hjá næmingunum.
Alt tað, sum teir ymsu flokkarnir funnu fram til, varð samanfatað í eina skrá fyri næmingafelagsfundi sama kvøld. Á fundinum vóru umleið 25 størri og smærri mál viðgjørd. Nøkur vórðu avgreidd beinanvegin, meðan bólkvórðu skipaðir at taka sær av teimum flestu málunum. Nakrir bólkar hava arbeitt væl, nakrir fóru í gongd, men hildu skjótt uppat, og nakrir fóru ongantíð í gongd.

15. december vóru aftur tjakfundir. Hesaferð var evnið Skemafrí vika. Tjakast varð um, um vit skuldu hava eina sekmafría viku í hesum skúlaárinum, hvat endamálið við henni skuldi vera, hvussu hon skuldi vera skipað og hvørjum evni/evnum vit skuldu arbeiða við.

Fyrireikandi arbeiðið til eina skemafría viku fór í gongd, men tað datt skjótt niðurfyri; einamest tí vit sóu, at vit vóru farin alt ov seint í gongd.




Vitin er útkomin 6 ferðir.

Veitslur: 4 veitslur hava verið, í oktober og til jóla 1972 og í februar og juni 1973.

Filmir.
Arbeiðið við at fáa filmir vístar á skúlanum verður nú gjørt av serstøkum felag, Hoydalar Kykmyndafelag.

Ítróttur.
Innan ítróttin hava ymsar kappingar verið hildnar á skúlanum.
Í september skipaði lll.g.m.y.fyri fótbóltskapping millum flokslið. Vinnari gjørdist l.g.m.y.
Miðskeiðis í november fekk ítróttarbólkurin í lag eina volleybóltkapping á skúlanum.
Hetta varð gjørt av tí, at H.B. skipaði fyri volleybóltkapping í Ítróttarhøllini, og vóru 2 mansliið og 1 kvinnulið teknað. Í innleiðandi kappingini á skúlanum gjørdist úrslitið, at av mansliðum komu lll.g.m.y og ll.g.m.y víðari, og bert 1 lið var við í kvinnudeildini.
Í mars manaði luttóku 3 mansliið og 1 kvinnulið í føroyameistaraskapinum í volleybólt.
Her hendi tað gleðiliga, at í mansdeildini gjørdist F.S. føroyameistari. Í kvinnudeildini varð F.S. nr. 4.
10. apríl skipaði ítróttarbólkurin fyri ítróttardegi uppi í Ítróttarhøllini. Dystast varð innan fótbólt, hondbólt, stafettrenning og posarenning, og við tað at ymiskt skemt eisini var á skránni, fall tíðin ikki long. Endað varð um 15-tíðina.



Samstarv við lærararáðið.
Til at taka sær av samstarvinum millum næmingafelagið og lærararáðið er í ár ein serstøk nevnd skipað, samstarvsnevndin.

# SAMSTARVSNEVNDIN



Í samstarvsnevndini sita: rektor, formaðurin í lærararáðnum, 2 lærarar (valdir av lærararáðnum), formaðurin í næmingafelagnum og 2 næmingar. Hesir næmingar kunnu vera ymiskir, alt eftir, hvørji mál skulu viðgerast.
Í samstarvsnevndini í ár hava hesi verið: Arnbjørn Mortensen, Petur Zachariassen, Anna Thomsen, Claus Reistrup, Magni Dalsgaard og (fyribils settir av næmingafelagsnevndini) Jógvan Mørkøre og Tróndur Hansen.
Í samstarvsnevndini verða øll tey mál, ið hava samband við bæði næmingar og lærarar og skúlan sum heild at gera, viðgjørd.
2 fundir hava verið í samstarvsnevndini.
Á skránni hevur verið ymiskt viðvíkjandi innrættan og amboðum á skúlanum.



# REGLUR
# fyri
# NÆMINGARNAR



1) Næmingarnir hava møtiskyldu. Einasta grund, sum kann góðtakast fyri at vera burtur frá skúla, er sjúka.

2) Frí verður bert givið í heilt serligum førum. Bygdanæmingar kunnu til dømis fáa frí til konfirmation hjá systkjum, silvurbrúdleyp hjá foreldrum og tílíkt. Næmingarnir skulu biðja rektor lova sær frí, og hann avger, um viðkomandi kann fáa frí ella ikki. Eingin næmingur má heldur í nøkrum einstøkum tíma vera burtur uttan loyvi frá rektor.

3) Hvør flokkur hevur skyldu til at halda skúlastovu sína ruddiliga og í hvørjum fríkorteri lata vindeyguni upp, so at frísk luft kann sleppa inn.

4) Allir næmingar eiga annars at gera sítt til, at alt er ruddiliga bæði úti og inni. Pappír og annað órudd má ikki tveitast á gólvini ella túnið, men skal koyrast í tær spannir, sum eru settar til at koyra burturkast í.

5) Næmingarnir skulu fara væl við innbúgvinum, borðum og stólum. Hendir nakar skaði, skal hann, ið skaðan hevur gjørt, endurgjalda tað, ið brotið ella løstað er, og hann skal beinan vegin siga rektor frá tí, hann hevur gjørt.



6) Royking er loyvd inni bert í frí-korterunum á niðastu gongd og í matarhølini.

7) Allir næmingar, sum hava cyklu við, skulu seta tær í cyklustøðurnar úti ella inni, og cyklurnar skulu vera læstar. Tað er næmingunum strangliga bannað at pilka við cyklurnar hjá øðrum, sum t.d. at starta motorcyklur. Tað er ikki loyvt næmingunum í frí-korterunum at vera inni í cykluskúr-inum. Heldur ikki er tað loyvt at cykla í skúlatúninum í fríkorteru-num, og somuleiðis verða næmingarnir bidnir um at cykla hampuliga til og frá skúla, so at teir ikki gera sær sjálvum, øðrum sum cykla, motorcyklum, bilum og teimum, sum ganga, skaða.

8) Næmingarnir eiga ikki at lata pengar og virðismiklar lutir liggja í lumm-unum á teimum klæðum, sum verða hongd í klædnarúmið.

9) Yvirhøvur eiga næmingarnir at vísa sámuligan atburð bæði úti og inni, í fríkorterunum og í tímunum, so at ar-beiðsfriður kann vera.

# FIMLEIKUR

Vil nakar næmingur sleppa undan fimleiki, skal í hvørjum einstøkum føri verða sagt fimleikarlæraranum frá og grund verða givin fyri tí. Skal hann sleppa undan meira enn eina viku, krevst læknaváttan. Oyðubløð, sum eru góðkend av undirvísingarmálaráðnum til hetta endamál, eru at fáa á skúlanum.

# SKÚLALÆKNIN

Allir næmingar hava verið hjá skúlalækna í hesum skúlaárinum. Skúlalækni er H. Debes Joensen, landslækni. Sjúkrasysturin er frú Gurli Restorff.

Lærararnir hava eisini allir, umframt annað starvsfólk verið til tuberklakanningar í hesum skúlaári.

# STUDNINGUR 1972-73

Næmingarnir kunna søkja sær peningaligan styrk frá Føroya løgtingi og frá Statens Uddannelsesstøtte (S.U.).

Løgtingið hevur latið 85.000 kr. til avbygdanæmingar í real- og studentadeildini í fíggjarárinum 1971-72.

S.U. hevur hetta skúlaár latið umleið 85o.ooo kr. til næmingarnar í studentadeildini. Næmingar yvir 2o ár hava umframt fingið lán tilsamans umleið 65.ooo kr.

S.U. hevur eisini latið studning til næmingar í 1. og 2. real, men skúlin hevur einki yvirlit yvir, hvussu nógv hesir næmingar hava fingið, við tað at skúlin bert býtir út umsøknarbløðini, og sóknarstýrini síðan býta út studningar. Eisini næmingar í 3. real hava fingið munandi studning frá S.U.

## UPPTØKA í studentadeildirnar

Fyri at sleppa á studentadeildirnar krevst realprógv ella at næmingurin hevur gingið tvey ár (í fyrsta og øðrum flokki) í trýára realdeild. Fyri at sleppa inn skal næmingurin fylla 16 ár innan 1. februar í skúlaárinum. Um næmingurin er yvir 19 ár, skal søkjast um undantaksloyvi, um annars pláss er.

Hjá teimum, sum vilja sleppa inn á nýmálsligu deildina, verður serliga lagdur dentur á karakterirnir í engilskum og týskum, umframt at prógv krevst fyri latínroynd. Fyri teir næmingar, ið ikki hava prógv fyri latínroynd, verður skipað fyri skeiði í latíni á skúlanum frá 18. august til síðst í oktober og fyri at standa royndina, ið hildin verður fyrst í november, krevst 6,o. Hjá teimum, sum vilja sleppa inn á matematisku deildina, verður serliga lagdur dentur á karakterirnar í matematikk og fysikk. Og so fyri báðar deildirnar karakterirnar í føroyskum og donskum.

# KOSTDEILDIN



Innivist fáa bæði real- og studentanæmingar. Tað eru serliga tey fíggjarligu korini hjá foreldrunum, sum eru avgerandi fyri upptøkuna.

Næmingur, sum er upptikin, kann einans siga upp tvær ferðir árliga: fyrstu ferð til jólar, annars til skúlaárslok.

Kostdeildin letur seingjartoy og handkløð ókeypis og letur tey vaska. *Handkløð, sum nýtt verða í samband við fimleik á skúlanum og í svimjihylinum, má næmingurin sjálvur keypa sær.*

Kostnæmingurin skal gjalda kr. 3200.— fyri alt skúlaárið, og verður goldið mánaðarliga framman undan kr. 320.—, fyrstu ferð tann 20. august, seinastu ferð tann 20. mai.

Avtala er gjørd við Havnar Sjúkrakassa, at allir kostnæmingar verða meldaðir til Andor Ellefsen, kommunulækna.

Ein vanligur skúladagur hjá kostnæmingunum er skipaður soleiðis:

$7^{15}$: Farið verður upp.

$7^{25}$: Ringur aftur upp.

$7^{35}$: Morgunmatur

$7^{55}$: Verður matstovan læst.
(eingin sleppur inn).

$8^{oo}$-$11^{5o}$: 4 skúlatímar.

$11^{5o}$-$12^{3o}$: Døgurði.

$12^{3o}$-$14^{15}$: 2 skúlatímar.

$14^{15}$: skúlatíðin liðug, drekka.

$16^{oo}$-$17^{3o}$: Lesifriður.

$18^{oo}$-$18^{3o}$: Nátturði.

$19^{oo}$-$2o^{3o}$: Lesifriður (næmingar úr 1. real
skulu

$19^{oo}$-$2o^{3o}$: Lesifriður (næmingar úr 1. real
skulu vera á teirra kømrum).

$2o^{3o}$: Kvølddrekka.

$22^{oo}$: Náttarfriður.

$23^{oo}$: Allir næmingar skulu vera á teirra
kømrum.

Leygarkvøld verður útiloyvi givið soleiðis:

| | |
|---|---|
| Næmingar úr 1. og 2. real | til kl. $0^{3o}$ |
| Næmingar úr 3. real og studentanæmingar | til kl. $1^{oo}$ |

Leygarkvøld situr serligur vaktarmaður, til allir næmingarnir eru komnir til hús.

Sunnukvøld verður útiloyvi givið soleiðis:

| | |
|---|---|
| Næmingar úr 1. og 2. real | til kl. $0^{oo}$ |
| Hinir (undir 18 ár) | til kl. $0^{3o}$ |

Útiloyvi út um vanligt mark verður bert givið 3. hvørt fríggjakvøld eftir samráðing við kostlærarin.

Annars hava allir næmingar, ið eru 18 ár og eldri útiloyvi alla náttina uttan mun til flokk. Hesir næmingar skulu bert siga við kostlærarin áðrenn kl. 23, at teir fara í býin. - Næmingar úr 3. G eru ikki bundnir til nakra reglu um útiloyvi.

Útiloyvi út um vanligt mark verður givið í einstøkum førum eftir samráðing við kostlæraran.

Kostnæmingurin sleppur ikki at gista í býnum einstakar nætur, uttan so at foreldrini geva sítt viðmæli. Hann fær loyvi til at vitja heima (t. d. week-end). Í hesum førum skal hann altíð *skriva seg upp á kontrollistan*, so at vakthavandi kostlærari veit, hvar næmingurin er.

Kostnæmingurin skal altíð biðja kostlæraran um loyvi til at ferðast út um Havnina. Kostnæmingarnir sleppa ikki at hava privat bil.

Kostdeildin er stongd í hesum frítíðum:

Heystfrí
Jólafrí
Páskafrí
Hvítusunnufrí
Summarfrí

Tó verður undantaksvíst loyvt næmingum at blíva verandi, um veðurlíkindini eru slík, at ikki slepst burtur.

*Nakrar reglur innandura*

Kostnæmingurin skal altíð skifta úr gonguskóm í inniskógvar, áðrenn hann fer inn í kamarið ella stovuna.

Áðrenn næmingurin fer í skúla um morgunin, skal hann rudda so mikið upp á kamarinum, at reingerðarkonan væl sleppur til at vaska og turka dust av. Bøkur og pappír skulu setast í bókahillarnar.

Í tíðini kl. 8—11 gerandisdagar eiga næmingarnir so vítt gjørligt ikki at ganga inn á gongir, stovu og kømur, so at reingerðarkonan kann fáa arbeiðsfrið.

Tað er forboðið at taka óviðkomandi skúlanæmingar við inn á kostdeildina í hesum tíðarskeiði. Annars hava skúlanæmingar, *sum ikki búgva á kostdeildini, onga atgongd til kostdeildina í skúlatíðini.*

Seingjarklæðini skulu leggjast í skuffuna, *áðrenn næmingurin fer í skúla.* Tá næmingur leggur seg um dagin, *skal hann nýta teppini — ikki seingjarklæðini.*

Tá næmingur fer út úr kamarinum, eigur hann at ansa eftir, at skápið er læst, so eingin óviðkomandi fær atgongd.

Radio, grammofon, bandupptakarar og musikktól er loyvt at nýta á kamarinum, men tey mugu altíð doyvast so niður, at ljóðið ikki er til ampa fyri onnur. Í lesitíðini mugu hesi tól ikki nýtast, ei heldur aftan á kl. 22.

Kostnæminginum verður loyvt at prýða veggirnar við myndum innan fyri rímuligt mark. Klistur (tape) má ikki nýtast til at festa myndir upp á tapetseraðar veggir. Her kunna teknistiftir verða nýttar.

Kortspæl verður loyvt í stovuni, men við máta. Tað má ikki spælast í lesitíðini, og tað er forboðið at spæla um pengar. Rúsdrekka má hvørki goymast ella skeinkjast á kostdeildini. Næmingur, ið brýtur hesa reglu, verður burturvístur beinan vegin. *Royking er einans loyvd á felagsstovuni vegna eldsvandan.*

### *Nakrar reglur uttandura*

Kostnæmingarnir sleppa at nýta bóltvøllin við Hoydalsá, tó ikki sunnu- og halgidagar millum kl. 11—13.

Næmingarnir sleppa at nýta fimleikarhøll skúlans og skúlabókasavnið eftir reglum, sum rektarin og skúlabókavørðurin áseta.

Kostnæmingarnir eiga at vísa høviskan atburð móti starvsfólki og lærarum. Næmingur, sum brýtur reglurnar, fær í fyrstu syftu eina ávaring, í aðru syftu verður hann vanliga burturvístur frá kostdeildini.

*Starvs- og tænastufólk á kostdeildini*

*Køkurin* (telefon 13771)

Hovmeistari: Hans J. Dam Jacobsen

1 assistentur og 4 køksgentur.

3 reingerðarkonur

Hjálpar- og umsjónarmaður:
Arne Hoydal (telefon 11674)

2 kostlærarar á dreingjadeildini:
Hans J. Dam Jacobsen (telefon 13772)
Ásmund Johannesen (telefon 13773)

Eftirlit við gentudeildini:
Katrin P. Thomassen (telefon 13265)

Húsmóðir og fyristøðumaður:
Elin og Ásmundur Johannesen (telefon 13773)

*Næmingatelefonir:* Dreingjadeildin nr. 11822
Gentudeildin nr. 11870



Til áminningar.

Týsdagin 27. februar vórðu øll á skúlanum skakað av brádligu deyðsboðunum av næminginum í l.g.n.b, Rothu Poulsen. Púra óvæntað doyði Rotha á Landssjúkrahúsinum náttina til týsdagin.

Næmingarnir á skúlanum søgdu skúlafelagi sínum farvæl og sýndu samkenslu sína við foreldur og slekt við í stórum tali at fylgja kistuni av Landssjúkrahúsinum oman á Pride hósdagin.

Um Rothu eru hjá skúlafeløgum og bústaðarfeløgum á gentu - kostdeildini bert góð minni.

